# Frágreiðing frá Barnaverndarstovu Føroya fyri 2023

## Grundað á hagtøl frá barnaverndartænastunum og Fosturforeldraskipanini

November 2024 (2. útgáva)

# Innihald


1 Inngangur ... 3

2023 í stuttum ... 4

2 Barnaverndarøkið ... 7

2.1 Lógarbundnar uppgávur ... 7

2.2 Barnaverndartænasturnar ... 7

3 Skrásett barnaverndarmál í 2023 ... 8

3.1 Hvussu byrja barnaverndarmálini? ... 10

3.2 Barnið sum offur og hættislig atferð hjá barni ... 13

4 Børn til fosturs, til umlætting og á stovni ... 15

4.1 Børn til fosturs ... 15

4.1.1 Fosturforeldraskipanin ... 15

4.1.2 Umsorganaryvirtøkur ... 17

4.2 Børn til umlætting ... 18

4.3 Børn á stovni ... 19

5 Fígging og kostnaður av barnavernd ... 19

5.1 Samanbering við Danmark ... 20

5.2 Útreiðslubýtið á barnaverndarøkinum ... 20

5.3 Útreiðslur hjá kommunum eftir samstarvsøki ... 23

5.4 Barnavernd í mun til samlaðu útreiðslurnar hjá kommunum ... 23

5.5 Tal á starvsfólki og tímum við ársenda 2023 ... 24

# 1 Inngangur

Barnaverndarstovan virkar fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkið í Føroyum. Hetta við at ráðgeva, undirvísa og vegleiða barnaverndartænasturnar kring landið, sum hava ábyrgd av at tryggja hjálp ella stuðul til hvørt einstakt barn. Harumframt umsitur Barnaverndarstovan Fosturforeldraskipanina og Barnahúsið.

Hagtalsfrágreiðingin hjá Barnaverndarstovu Føroya lýsir virksemið í barnaverndartænastunum og Fosturforeldraskipanini við støði í barnaverndarlógini. Hagtølini lýsa gongd og tal av barnaverndarmálum og børnum, ið eru sett heiman, á ymsan hátt. Aftur í ár eru komnar nakrar talvur afturat. Miðað er eftir at skapa betri og greiðari yvirlit yvir barnaverndarøkið við uppaftur fleiri hagtølum. Endamálið við innsavningini av hagtølum er at betra um grundarlagið fyri avgerðum á barnaverndarøkinum, herundir at lofta nýggjum rákum í gongdini. Hagtølini kunnu samanberast nøkur ár aftur.

Hetta er 2. útgáva av hagtalsfrágreiðingini fyri 2023. Tann fyrra kom í juni, men tað hevur víst seg, at nakrar kommunur hava latið Gjaldstovuni fíggjarhagtøl eftir juni 2024. Hetta hevur broytt 5. part, *Fígging og kostnaður av barnavernd*, so mikið, at hendan útgávan við hesum verður latin. 5. partur er einasti munur millum fyrru og seinnu útgávuna.

**Innihald**

Hagtølini eru árlig uppgerð av virkseminum hjá barnaverndartænastunum og Fosturforeldraskipanini uppgjørt í tali av málum, heimansettum børnum, hvørjir bólkar boða frá og hví, og hvørjar orsakirnar eru til, at mál byrja og enda. Støðan er pr. 31.12.2023. Summi tøl eru býtt upp á tey átta barnaverndarøkini, meðan onnur eru fyri landið samlað; tað valdast um støðd á tølum. At enda verða fíggjarhagtølini uppgjørd.

Hagtølini taka støði í persónum 0-23 ár, sum eru undir barnavernd. Tey verða gjørd upp eftir hagtølum, sum tær átta barnaverndartænasturnar lata Barnaverndarstovu Føroya eftir fráboðarum, orsakum til fráboðan og orsakum til at mál enda. Harumframt eftir kyni og aldri.

Fyri at tryggja, at upplýsingarnar í hesi frágreiðing eru rættar, er frágreiðingin, eins og undanfarin ár, send øllum barnaverndartænastunum til gjøgnumgongd, ummælis og góðkenning, áðrenn hon er almannakunngjørd.

Barnatølini eru frá hagstova.fo. Fíggjarhagtøl eru lutvíst frá gjaldstovan.fo og lutvíst upplýst frá barnaverndartænastunum.

**Endamál**

Síðan Barnaverndarstova Føroya varð sett á stovn í 2006, hevur verið arbeitt miðvíst við at fáa til vega hagtalstilfar. Endamálið er at betra um grundarlagið fyri avgerðum á barnaverndarøkinum, umframt at geva leiðslunum, ið varða av barnaverndarøkinum í Føroyum, eina rættvísandi mynd av støðuni hjá einstøku barnaverndartænastunum. Taltilfarið kann eisini nýtast sum grundarlag hjá kommununum, tá tær leggja sítt virksemi til rættis. Hendan almenna hagtalsfrágreiðingin inniheldur tó yvirskipað tøl fyri landið. Við átta

barnaverndartænastum skerst ikki burtur, at tølini fleiri staðni verða ov smábýtt at leggja fram alment.

Sambært barnaverndarlógini hava allar barnaverndartænastur í landinum skyldu at lata upplýsingar um barnaverndarmál til Barnaverndarstovu Føroya.

## 2023 í stuttum

***Ætlanir um betri umstøður hjá fosturfamiljum***

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at ætlanir eru um at betra umstøðurnar hjá fosturfamiljum, millum annað við at geva møguleika fyri sokallaðum styrktum og spesialiseraðum fosturforeldrum. Endamálið er at lata upp fyri, at fleiri børn kunnu vera í fosturheimum í staðin fyri á barnaverndarstovnum. Hesum ætlanum heilsa vit vælkomnum, og vóna inniliga at síggja gjørligar og ítøkiligar ætlanir fyrsta dagin. Hetta fer millum annað at krevja førleikamenning av fosturforeldrunum og tørv á størri starvsfólkatilfeingi hjá Barnaverndarstovuni/Fosturforeldraskipanini – við øðrum orðum meirútreiðslur, sum kommunur og land mugu samráðast um fíggingarleist til.

***Barnavernd uttan familjudepil ár um ár ...***

Manglandi familjudepilin hevur nú á triðja ári merkt virksemi okkara. At tað ikki ber til at vísa familjur til familjudepil er ein órímiligur meinbogi, ið ger føroyska barnaverndararbeiðið ófullfíggjað. Í fyrsta lagi er avleiðingin, at barnaverndartænastunum vantar amboð til neyvar eygleiðingar av foreldraførleika. Í øðrum lagi hevur manglandi familjudepilin við sær, at foreldrini ikki fáa møguleikan at búnast sum foreldur, samstundis sum tey verða eygleidd og fáa ráðgeving. Hetta merkir, at neyðugt verður at gera fleiri foreldraførleikakanningar av sálarfrøðingum, ið hevur við sær munandi eyka útreiðslur. Sostatt kann bæði vera orsøk at síggja fyri sær umsorganaryvirtøkur, ið sloppið kundi verið undan, og at børn í summum førum verða verandi í heimum, har tað møguliga var fyri barnanna besta, at tey vórðu sett heiman

***Barnahúsið 10 ár***

Barnaverndarstovan samskipar Barnahúsið, sum er tvørgeiraligt samstarv millum avvarðandi myndugleikar í málum um ágang á børn, tá tørvur er á tí. Í Barnahúsinum savnast umboð fyri kommunu, tað vil siga barnaverndartænasta, umframt løgregla og sjúkrahúsverk, fyri at samskipa arbeiðið um barnið. Endamálið er, at barnið fær røttu hjálp og rættan stuðul í barnavinarligum kørmum og at tryggja neyðug prógv.

Um ólavsøkumundið flutti Barnahúsið í onnur høli, eftir at fyrrverandi hølini skuldu takast niður. Arbeitt hevði verið við ymsum loysnum, millum annað at útbyggja annað av húsunum hjá Kommunufelagnum til eisini at fevna um Barnahús. Niðurstøðan gjørdist at flyta í onnur høli, sum hava á leið somu hentleikar og stand sum tey fyrru.

Í 2023 vórðu 53 nýggj barnahúsmál stovnað. Hetta eru fleiri enn dupult so mong í mun til 2022 og nógv tað størsta talið í 10 ára søguni hjá Barnahúsinum. Miðaltalið er 32 mál um

árið, og talið á málum hevur annars sveiggjað úr 20 upp í 39 mál. Út frá tølunum á málum ber ikki til at greiða frá, hví tølini eru, sum tey eru. Orsakirnar kunnu vera fleiri. Ein orsøk kann vera, at tað í 2023 vóru fleiri mál, har illtonktu gingu aftur í fleiri málum. Eisini kann nevnast, at tað í farna ári vóru lutfalsliga nógv mál, sum snúðu seg um lokking á netinum *(grooming)*.

### *Barnaverkætlanin*

Frá á sumri 2023 hevur Barnaverndarstovan tikið lut í barnaverkætlanini, sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur koyrt av bakkastokki. Talan er um víðfevnda og framsøkna verkætlan, og vit kýta okkum við íkasti til, at røkkast kann á mál.

Seinasta verkætlanin, vit luttóku í, var umskipan av virkseminum á Familjudepilinum og ein skjótt arbeiðandi arbeiðsbólkur læt álit frá sær flaggdagin. Nú verður bíðað eftir politiskari støðutakan til, hvussu víðari skal farast fram.

### *Nýggjar lógir – stórir batar*

Við virknaði frá 1. januar 2024 samtykti løgtingið at veitast skal sálarfrøðiligt viðgerðartilboð til harðskapsrakt børn, íroknað børn, sum flyta á Kreppumiðstøðina saman við mammuni. Barnahúsið hevur fingið hesa nýggju uppgávu, og vit leggja drúgva orku í at snikka eitt haldgott sálarfrøðiligt viðgerðartilboð til harðskapsraktu børnini, sum eru fevnd av tí. Vit fegnast mikið um hendan týðandi bata, sum vit eru sannførd um fer at hjálpa børnunum í støðuni við harðskapi og at fyribyrgja langtíðarárin av harðskapinum.

Í øðrum lagi samtykti løgtingið í desember 2023 einmælt at broyta revsilógina um kynsliga avnoyðslu og lokking. Hetta hevur við sær, at lokking og kynslig avnoyðsla eru vorðin kynslig brotsverk í Føroyum, eins og tey eru í nógvum øðrum londum. Áðrenn lógarbroytingina var torført hjá ákæruvaldinum at lyfta próvbyrðuna í sambandi við lokking og avnoyðslu.

Sjálvandi ber ikki til at lóggeva seg burtur úr, at kynsligur ágangur so sum lokking kemur fyri. Men lógarbroytingin er eitt týðandi fet rætta vegin til betri verju av børnum og ungum fyri kynsligum ágangi. Barnaverndarstovan metir tað rættiliga sannlíkt, at nýggja lógin fer at hava við sær fleiri barnaverndar- og barnahúsmál framyvir.

### *Børn við útlendskum uppruna*

Seinnu árini er talið á fólki við útlendskum uppruna vaksið í Føroyum. Her verður hugsað um fólk úr øðrum londum enn Norðurlondum. Í barnaverndarmálum síggjast eisini børn við útlendskum uppruna. Seinastu trý árini hava barnaverndartænasturnar tískil talt saman barnaverndarmál við børnum, har annað ella bæði foreldrini hava útlendska bakgrund, har ríkisborgarar úr Danmark, Grønlandi, Íslandi, Noregi, Svøríki og Finnlandi ikki telja við sum útlendingar. Tølini vísa greitt, at talið á málum við útlendskum børnum er yvirumboðað samanborið við føroysk. Tað vil siga, at talið av barnaverndarmálum við útlendskum børnum í mun til talið av útlendskum børnum í Føroyum er munandi størri enn talið av barnavendarmálum við føroyskum børnum í mun til talið av føroyskum børnum. Her skal

dentur leggjast á, at hesi tølini annars ikki eru granskað, tá tað ræður um álvarsemi ella slag av málum. Eins og málini við upprunaføroyskum børnum eru ymisk í álvarsemi, er tað sama galdandi fyri børn við útlendskum uppruna. Men barnaverndartænasturnar vísa á, at málini við útlendskum børnum hava tað til felags, at tey eru trupul at handfara vegna forðingar orsakað av málsligum- og mentanarligum muni. Barnaverndartænasturnar vísa á, at partur av frágreiðingini helst er manglandi skipað integratión av tilflytarunum. Harumframt eru starvsfólk í barnaverndartænastunum ikki nóg væl útbúgvin at handfara viðskiftafólk við øðrvísi mentanum og fremmandum máli. Føroyar mugu taka sín part í altjóðasamfelagnum. Men skipanir mugu gerast til tess at lofta hesum.

***Annað virksemi***

Barnaverndarstovan savnar regluliga leiðararnar fyri barnaverndartænasturnar fyri saman at seta út í kortið og fyri at einshátta viðgerðina av barnaverndarmálum. Skipað hevur verið fyri fleiri skeiðum innan málsviðgerð og fyrisitingarrætt. Dentur hevur verið lagdur á at styrkja løgfrøðiliga førleikan hjá barnaverndartænastunum. Til tess at førleikamenna sálarfrøðingar, ið starvast í barnaverndartænastunum, verður skipað fyri skeiðum. Fyri fosturforeldrum hevur Barnaverndarstovan skipað fyri kafékvøldum við fakligum innihaldi.

Í samstarvi við barnaverndartænasturnar hevur eisini í 2023 verið arbeitt við dagføringum av innanhýsis arbeiðsskjølum og mannagongdum. Hesum verður hildið fram við.

Barnaverndarstova Føroya, 14. november 2024

Oddbjørg Balle, leiðari

# 2 Barnaverndarøkið

Barnaverndarøkið varð skipað av nýggjum 1. januar 2006, tá partur av málsøkinum varð lagt til kommunurnar at gjalda og umsita. Um somu tíð stovnaðu kommunurnar í felag Barnaverndarstovu Føroya.

## 2.1 Lógarbundnar uppgávur

Barnaverndarstovan skal:
• arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkið í landinum
• virka sum ráðgevi hjá landsstýrismanninum viðvíkjandi stevnumiðum á barnaverndarøkinum
• vegleiða og ráðgeva barnaverndartænastunum í almennum spurningum viðvíkjandi viðgerð av barnaverndarmálum
• veita barnaverndartænastunum undirvísing viðvíkjandi uppgávum teirra sambært barnaverndarlógini
• skipa og umsita Fosturforeldraskipanina
• syrgja fyri menning á økinum
• savna saman og umsita hagtøl á økinum
Harumframt stendur Barnaverndarstovan fyri virkseminum í Barnahúsinum.

## 2.2 Barnaverndartænasturnar



Landið er býtt upp í 8 *barnaverndartænastur*, sum er felagsheitið fyri barnaverndarnevnd og barnaverndarumsiting. 7 av teimum 8 barnaverndartænastunum arbeiða í samstarvsøkjum. Bert Tórshavnar kommuna hevur sína barnaverndar-tænastu einsamøll. Samstarvsøkini skulu sambært lógini skipast samsvarandi eindunum í lógini um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur. Samstarvsøki kunnu samstarva um felags barnaverndarnevnd, og samstarvsøkini skulu tá vera samfeld landafrøðiliga ella samferðsluliga. Tó kann landsstýrismaðurin loyva, at fleiri barnaverndarnevndir verða skipaðar innan einstøku samstarvsøkini, treytað av, at tað í minsta lagi eru 3.000 íbúgvar fyri hvørja barnaverndarnevnd (Sandoy og Skúvoy undantiknar.

**Barnaverndarøkini**

- Barnaverndartænastan fyri Norðuroyggjar er samstarv millum: Fugloyar-, Klaksvíkar- , Kunoyar-, Viðareiðis- og Hvannasunds kommunur.
- Barnaverndartænastan fyri Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunur.
- Barnaverndartænastan við Skálafjørðin er samstarv millum Nes-, Runavíkar- og Sjóvar kommunur.

- Barnaverndartænastan í VEKS er samstarv millum Vestmanna-, Eiðis-, Kvívíkar- og Sunda kommunur.
- Barnaverndartænastan fyri Vága- og Sørvágs kommunur.
- Barnaverndartænastan fyri Tórshavnar kommunu.
- Barnaverndartænastan fyri Sandoyar og Skúvoyar kommunur.
- Barnaverndartænastan fyri Suðuroy.

# 3 Skrásett barnaverndarmál í 2023

Barnaverndarmál eru ymisk og fevna víða. Summi snúgva seg um ráðgeving, meðan onnur eru álvarslig inntriv, har børn verða sett heiman. Sostatt ber illa til at samanbera støðuna hjá barnaverndartænastunum kring landið, einans út frá hvussu nógvum málum tær hava ábyrgd av. Tó vísa hagtølini ár um ár, í hvønn mun talið av barnaverndarmálum broytist, og um fyriskipanirnar, ið barnaverndartænasturnar seta í verk, tæna sínum endamáli.

Hvørt barn er skrásett sum eitt mál. Hetta merkir, at ein familja kann vera skrásett sum fleiri barnaverndarmál, um fyriskipanir verða settar í verk fyri fleiri børn í somu familju.

**Talva 1: Barnaverndarmál 2010-2023**




949 barnaverndarmál í 2023 er eitt heldur størri tal enn undanfarnu árini, tó at tað ikki víkir heilt av leið frá teimum seinastu sæð í mun til fólkavøksturin. Barnaverndarstovan fær ikki víst á einstakar frágreiðingar til hækkingina.

Niðanfyri verður tal á barnaverndarmálum sett í mun til barnatalið.

**Talva 2: Virkin barnaverndarmál 2023 - og % av barnatalinum**

| | | Barnatal í økinum ultimo 2023 | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Mál tils.** | **0-17** | **18-22** | **Tils.** | **%** |
| Norðoyggjar | 119 | 1.502 | 442 | 1.944 | 6,1 |
| Eysturk./Fuglafj. | 68 | 990 | 259 | 1.249 | 5,4 |
| Skálafjørður | 105 | 1.842 | 438 | 2.280 | 4,6 |
| VEKS | 72 | 1.087 | 283 | 1.370 | 5,3 |
| Vágar | 64 | 874 | 238 | 1.112 | 5,8 |
| Tórshavn | 420 | 5.610 | 1.582 | 7.192 | 5,8 |
| Sandoy | 30 | 262 | 82 | 344 | 8,7 |
| Suðuroy | 71 | 1.031 | 262 | 1.293 | 5,5 |
| **Alt landið** | **949** | **13.198** | **3.586** | **16.784** | **5,7** |

Talið á virknum barnaverndarmálum við ársenda var 949. Hetta er á leið á sama stigi sum undanfarin ár. Lutfalsliga fæst mál hevði Skálafjørðurin við 4,6 av barnatalinum í økinum. Flest mál í mun til barnatal hevði Sandoy við 8,7 %, og síðani koma Norðoyggjar við 6,1 %.

Eisini sæst, at barnaverndarmál í % av barnatalinum til samans er 5,7 % fyri alt landið, sum er 0,5 meira enn undanfarna ár. Síðan 2016 hevur hetta virðið sveiggjað millum 5,1 og 5,6 %, sum sæst í næstu talvu:

**Talva 3: Virkin barnaverndarmál í % av barnatali**

| | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** | **2019** | **2018** | **2017** | **2016** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoyggjar | 6,1 | 5,7 | 5,7 | 5,9 | 6,4 | 4,3 | 5,3 | 4,9 |
| Eysturk./Fuglafj. | 5,4 | 6,1 | 5,2 | 5,5 | 7 | 4,1 | 4,5 | 4,6 |
| Skálafjørður | 4,6 | 3,7 | 4,6 | 5,4 | 6 | 5,5 | 6,6 | 7,4 |
| VEKS | 5,3 | 4,5 | 2,6 | 4,0 | 4,4 | 5,1 | 4,7 | 4 |
| Vágar | 5,8 | 5,0 | 4,9 | 4,1 | 6,3 | 4,8 | 7,2 | 6,8 |
| Tórshavn | 5,8 | 5,1 | 5,7 | 5,5 | 5,1 | 4,9 | 4,6 | 4,4 |
| Sandoy | 8,7 | 9,4 | 8,9 | 9,3 | 8,7 | 7,5 | 6,7 | 6,2 |
| Suðuroy | 5,5 | 6,3 | 7,1 | 6,5 | 4,9 | 6,8 | 7,9 | 8,6 |
| **Alt landið** | **5,7** | **5,2** | **5,4** | **5,5** | **5,6** | **5,1** | **5,4** | **5,6** |

**Talva 4: Virkin barnaverndarmál býtt á gentur og dreingir 2023**

| Mál gentur | | Mál dreingir | | Mál bæði kyn | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 0-17 ár | 18-22 ár | 0-17 | 18-22 | Tils. | 0-17 | 18-22 |
| 445 | 34 | 449 | 21 | 949 | 894 | 55 |

Fyri børn upp til og við 17 ár var mestsum javnvág millum kynini: 445 gentur og 449 dreingir. Men í bólkinum 18-22 er yvirvág av gentum: 34 gentur og 21 dreingir.

## 3.1 Hvussu byrja barnaverndarmálini?

Barnaverndarlógin fevnir um børn, ið liva undir viðurskiftum, sum kunnu skaða teirra heilsu og menning.

Við barnaverndarlógini vildi løggevari, at barnaverndartænasturnar skuldu fáa møguleika at savna sína orku um tey børn í samfelagnum, sum hava størstan tørv á stuðli og hjálp. Tí fevnir barnaverndarlógin ikki um trivnaðin hjá børnum í síni heild. Lógin fevnir heldur ikki um børn, ið bera brek, uttan so, at tey samstundis liva undir umstøðum, sum kunnu skaða teirra heilsu og menning vegna foreldranna vantandi førleikar.

> Fyri at tryggja, at barnaverndar-tænasturnar fáa kunnleika um børn, sum liva undir viðurskiftum, ið ikki eru nøktandi, er fráboðanarskylda ásett í barnaverndarlógini.

Lógin sigur, at øll hava fráboðanarskyldu, men skilir tó millum vanliga borgaran, ið kann vera ónavngivin, og tann, sum í starvi sínum hevur við børn at gera. Í seinna førinum er kravið, at fráboðanin skal verða navngivin. Í sambandi við endurskoðan av barnaverndarlógini varð fráboðanarskyldan hjá fakfólki herd við virknaði frá 1. juli 2012. Fakfólk hava skyldu at boða barnaverndartænastuni frá, um so er, at tey hava kunnleika til, ella hava orsøk at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini.

**Um fráboðanarskylduna sigur barnaverndarlógin:**

"§ 14. Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.
Stk. 2. Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari vanrøkir, meinslar ella misnýtir eitt barn, ella at barnið á annan hátt livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu ella menning, hevur skyldu til at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.
Stk. 3. Fráboðast skal eisini eftir stk. 1 og 2 um kvinnu, ið er við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t. d. vegna rúsevnismisnýtslu, sosialum ella sálarligum ávum.

Stk. 4. Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk sambært hesi lóg, sí §§ 45 og 49.
Stk. 5. Barnaverndartænastan skal boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin er móttikin. Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti hesum, skal barnaverndartænastan boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin hevur ført til, at málið verður kannað, ella at fyriskipanir eru settar í verk sambært hesi lóg. Afturboðanin fevnir bert um tann, ið fráboðað er um.
Stk. 6. Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti hesum, kann barnaverndartænastan, tá tað hevur avgerandi týdning fyri, hvørja hjálp og stuðul fráboðari sbrt. stk. 1 kann veita barninum, kunna um, hvørjar fyriskipanir eru settar í verk."
Sambært § 49, stk. 1 skal barnaverndartænastan tó beinanvegin og innan 24 tímar eftir eina fráboðan meta um, hvørt vandi er fyri barnsins heilsu og menning, og um bráðfeingis fyriskipan tí skal setast í verk.

Ein fráboðan sambært hesi grein nýtist ikki at merkja, at fyriskipan verður sett í verk. Barnaverndartænastan kannar og upplýsir í fyrstu syftu málið, og um komið verður fram til, at tað ikki er grundarlag fyri at seta fyriskipanir í verk, skal barnaverndartænastan onki gera, men loka málið.

**Talva 5: Nýggj barnaverndarmál í mun til talið av børnum (0-17 ár) til samans**

| | Mál tils | Barnatal í økjunum 0-17 ár | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | % av barnatali | | | | | | | |
| Norðoyggjar | 33 | 1.502 | 2,2 | 2,2 | 3,5 | 1,2 | 4,8 | 3,1 | 3,5 | 3,3 |
| Eysturk./ Fuglaf. | 37 | 990 | 3,7 | 2,9 | 2,0 | 1,4 | 3,5 | 2,1 | 2,0 | 1,2 |
| Skálafjørðurin | 56 | 1.842 | 3,0 | 1,9 | 1,8 | 3,0 | 3,6 | 1,4 | 1,6 | 2,3 |
| VEKS | 25 | 1.087 | 2,3 | 3,9 | 0,9 | 1,1 | 1,3 | 2,3 | 1,9 | 3,0 |
| Vágar | 38 | 874 | 4,3 | 4,0 | 5,0 | 1,5 | 3,9 | 2,8 | 1,1 | 0,9 |
| Tórshavn | 155 | 5.610 | 2,8 | 2,0 | 3,4 | 1,6 | 1,5 | 1,5 | 1,4 | 1,2 |
| Sandoy | 7 | 262 | 2,7 | 2,3 | 2,6 | 5,5 | 5,7 | 4,3 | 1,7 | 1,6 |
| Suðuroy | 31 | 1.031 | 3,0 | 1,9 | 3,7 | 1,4 | 2,0 | 3,0 | 1,4 | 3,3 |
| | | | | | | | | | | |
| **Alt landið** | **382** | **13.198** | **2,9** | **2,3** | **3,0** | **1,7** | **2,6** | **2,0** | **1,7** | **1,5** |

Í 2023 vórðu skrásett 382 nýggj mál í árinum. Árið fyri – í 2022 vóru 311 nýggj mál í árinum. Her er sostatt ein vøkstur á 71 mál, sum svarar til ein vøkstur á 23 %. Tey økini, sum høvdu vøkstur í nýggjum málum í mun til barnatalið í økjunum í farna ári vóru serliga Skálafjørður og Suðuroy, og teimum á baki Tórshavn og Eysturkommuna/Fuglafjørður. Størstu minkingina av nýggjum málum var í VEKS, sum fóru frá 3,9 til 2,3 % av barnatalinum.

Kynsbýtið í teimum nýggju 382 barnaverndarmálunum javnvigar við 191 dreingjum og 191 gentum:

**Talva 6: Nýggj barnaverndarmál býtt á gentur og dreingir 2023**

| ♀ Gentur | ♂ Dreingir | Tils. |
|---|---|---|
| 191 | 191 | 382 |

**Ófødd børn**

Talið á nýggjum barnaverndarmálum, sum snúðu seg um ófødd børn, var 5 í 2023, sum var tað sama fyri 2022 og 2021.

**Talva 7: Endað barnaverndarmál í 2023 í mun til talið av børnum og ungum (0-22 ár) til samans**

| | | Barnatal | % av barnatali | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tils. | 0-22 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
| Norðoyggjar | 44 | 1.944 | 2,3 | 2,4 | 2,4 | 0,7 | 2,0 |
| Eysturk./Fuglafj. | 21 | 1.249 | 1,7 | 1,8 | 1,4 | 1,5 | 1,3 |
| Skálafjørðurin | 42 | 2.280 | 1,8 | 2,4 | 2,3 | 3,3 | 1,6 |
| VEKS | 15 | 1.370 | 1,1 | 1,7 | 2,7 | 1,0 | 1,1 |
| Vágar | 36 | 1.112 | 3,2 | 3,4 | 3,6 | 3,7 | 2,4 |
| Tórshavn | 115 | 7.192 | 1,6 | 1,7 | 2,9 | 0,5 | 1,0 |
| Sandoy | 15 | 344 | 4,4 | 1,2 | 3,6 | 3,8 | 3,4 |
| Suðuroy | 22 | 1.293 | 1,7 | 1,6 | 1,5 | 1,1 | 0,8 |
| Alt landið | 310 | 16.784 | **1,8** | **2,0** | **2,6** | **1,3** | **1,3** |

**Talva 8: Endað barnaverndarmál býtt á gentur og dreingir 2023**

| ♀ Gentur | ♂ Dreingir | Til samans |
|---|---|---|
| 151 | 159 | 310 |

310 mál vórðu lokað í árinum, sum svarar til 1,8 % í mun til samlaða barnatalið 0-22 ár. Hetta er ein minking á 0,2 prosentstig samanborið við undanfarna ár.

**Talva 9: Hvør boðaðu barnaverndartænastum frá í 2023? Og % seinastu árini**

| Fráboðari | Tils | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Foreldramyndugleikin | 72 | 11 | 12 | 11 | 12 | 11 |
| Foreldur u. foreldramyndugleika | 8 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 |
| Barnið sjálvt | 2 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 |
| Skúli | 68 | 10 | 14 | 10 | 13 | 12 |
| Familja ella onnur, sum kenna familjuna | 24 | 4 | 4 | 7 | 4 | 5 |
| Dagstovnar, dagrøkt og frítíðarskúli | 45 | 7 | 9 | 9 | 8 | 8 |
| Løgreglan | 169 | 26 | 16 | 20 | 19 | 21 |
| Almannaverkið | 17 | 3 | 3 | 2 | 1 | 1 |
| Psykiatriski Depilin | 63 | 10 | 9 | 6 | 8 | 7 |
| Heilsufrøðingur | 22 | 3 | 6 | 5 | 7 | 6 |
| Kommunulækni og tannlækni | 21 | 3 | 2 | 3 | 2 | 2 |
| Skaðastova | 5 | 1 | 0 | 1 | 0 | 2 |
| Ljósmóðir | 2 | 0 | 2 | 2 | 2 | 2 |
| Onnur í heilsuverkinum | 12 | 2 | 2 | 3 | 2 | 2 |
| Annað barnaverndarøki | 24 | 4 | 2 | 4 | 4 | 7 |
| Aðrir felagsskapir | 13 | 2 | 2 | 1 | 1 | 1 |
| Barnaverndartænastan tekur sjálv málið upp | 15 | 2 | 4 | 2 | 2 | 3 |
| Ónevnd | 56 | 8 | 10 | 11 | 14*) | 10,8*) |
| Onnur | 24 | 4 | 2 | 2 | | |
| **Til samans** | 662 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

*) Til 2020 vóru "Onnur" og "Ónevnd" í einum.

Tann, sum stendur fyri munandi flest fráboðanum, er løgreglan. Harnæst koma foreldramyndugleikin, skúli, Psykiatriski depilin, ónevnd og bólkurin, dagstovnar, dagrøkt og frítíðarskúli. Samlaða talið av fráboðanum – 662 fráboðanir – samsvarar ikki við samlaða talið á nýggjum barnaverndarmálum í talvu 5, sum er 382. Orsøkin er, at tað oftari enn so er talan um meira enn *eina* fráboðan í hvørjum máli. Eisini ber til, at fráboðanir koma um børn, sum framman undan eru barnaverndarmál.

Samlaða talið av fráboðanum í 2022 var 498, so her er talan um eina hækking á 164 fráboðanir.

## 3.2 Barnið sum offur og hættislig atferð hjá barni

Barnaverndarmál kunnu verða býtt í tveir flokkar: harðskap og vanrøkt. Við harðskapi verður meint við gjørda gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menningina hjá barninum. Við vanrøkt verður meint við ógjørda gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menningina hjá barninum.

**Talva 10: Orsakir til fráboðanirnar í 2023**

| | 2023 | 2022 | 2021 | 2023 í % | 2022 í % | 2021 í % |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Vanrøkt** | | | | | | |
| Kenslulig/sálarlig vanrøkt | 227 | 170 | 179 | 34 | 31 | 31 |
| Vanrøkt í sambandi við umsjón og eftirlit | 92 | 96 | 78 | 14 | 18 | 14 |
| Vanrøkt í sambandi við skúlagongd | 27 | 26 | 33 | 4 | 5 | 6 |
| Likamlig vanrøkt | 13 | 15 | 23 | 2 | 3 | 4 |
| *Til samans* | *359* | *307* | *313* | *55* | *57* | *55* |
| | | | | | | |
| **Harðskapur** | | | | | | |
| Kensluligur/sálarligur harðskapur | 31 | 8 | 31 | 5 | 1 | 5 |
| Likamligur harðskapur | 40 | 14 | 25 | 6 | 3 | 4 |
| Kynsligur harðskapur (ágangur) | 33 | 33 | 14 | 5 | 6 | 2 |
| *Til samans* | *97* | *55* | *70* | *15* | *10* | *11* |
| | | | | | | |
| **Heilsa ella lív hjá ófødda barninum í vanda, § 14, stk. 3** | | | | | | |
| Heilsa ella lív hjá ófødda barninum í vanda, § 14, stk. 3 | 6 | 5 | 11 | 1 | 1 | 2 |
| *Til samans* | *6* | *5* | *11* | *1* | *1* | *2* |
| | | | | | | |
| **Hættislig atferð hjá barninum** | | | | | | |
| Barnið hevur trupulleikar í skúlanum ella vanrøkir skúlan | 44 | 51 | 26 | 7 | 9 | 5 |
| Misgerðir hjá barni, t. d. kemur ikki til hús ásettar tíðir, tað biddar, rýmir, brýtur inn ella ger herverk | 66 | 35 | 49 | 10 | 6 | 9 |
| Barnið fremur likamligan ella kynsligan harðskap móti øðrum barni ella vaksnum persóni | 10 | 24 | 28 | 2 | 4 | 5 |
| Barnið setur egna heilsu og menning í vanda | 56 | 44 | 48 | 9 | 8 | 8 |
| Barnið tekur rúsevni/rúsdrekka | 20 | 21 | 26 | 3 | 4 | 5 |
| *Til samans* | *196* | *175* | *177* | *30* | *32* | *32* |
| | | | | | | |
| **Orsakir til fráboðanir til samans** | **658** | **542** | **571** | **100** | **100** | **100** |

Legg til merkis, at til ber at skráseta meira enn eina orsøk til fráboðan fyri hvørt mál. Eins og undanfarin ár er bólkurin, vanrøkt, tann, sum oftast verður ásett sum orsøk til fráboðan við 359. Á bvs.fo ber til at lesa meira um ymisku sløgini av vanrøkt og ágangi.

Í talvuni sæst, at talið á orsøkum er heldur størri fyri 2023 enn fyri bæði undanfarin ár.

**Talva 11: Orsakir til at mál endaðu í 2023**

| | Alt landið | %-býti 2023 | 2022 | 2021 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Endamálið rokkið | 184 | 59 | 70 | 69 | 59 |
| Foreldur og/ella barn vilja ikki hava hjálp/fyriskipan *) | 25 | 8 | 3 | 3 | 4 |
| Barnið er fylt 18 ár | 18 | 6 | 7 | 6 | 10 |
| Familjan flutt av landinum | 15 | 5 | 4 | 5 | 9 |
| Familjan flutt til annað barnaverndarøki | 26 | 8 | 5 | 7 | 6 |
| Víst til annan myndugleika | 44 | 14 | 10 | 9 | 12 |
| ***Til samans*** | 312 | 100 | ***100*** | ***100*** | ***100*** |

**) Tá foreldur/barn ikki vilja samstarva við barnaverndartænastu, skal barnaverndartænastan meta um, hvørt farast skal fram við tvingsli, ella um málið verður lokað.*

Gev gætur, at til ber at skráseta meira enn eina orsøk til, at eitt mál verður endað.

# 4 Børn til fosturs, til umlætting og á stovni

Her verður greitt frá fyriskipanunum, tá børn verða sett til fosturs, til umlætting og á stovn.

## 4.1 Børn til fosturs

Tá umstøðurnar í heiminum eru soleiðis, at tað ikki ber til hjá einum barni at verða búgvandi heima, verður kannað, um barnið kann verða sett í eina fosturfamilju. Havt eigur at verða í huga í hvørjum einstøkum føri, um næstrafólk, ella onnur, ið standa barninum nær, kunnu góðkennast sum fosturfamilja.

### 4.1.1 Fosturforeldraskipanin

Barnaverndarstovan, sum umsitur Fosturforeldraskipanina, ráðgevur fosturfamiljum og skipar regluliga fyri undirvísing og skeiðum fyri fosturforeldur.

Eitt fosturheim er sambært barnaverndarlógini at skilja sum eitt heim, har fosturforeldur hava umsorgan fyri einum barni í styttri ella longri tíðarskeið, tá ið tað verður sett heiman. Talan kann m.a. vera um umlætting, bráðfeingis fosturheim og fosturheim, har børn verða sett fyribils ella varandi til fosturs.

Krøvini til fosturfamiljur vóru frá 1. juli 2012 broytt soleiðis, at næstringar ella onnur, ið hava tætt samband við barnið, kunnu góðkennast sum fosturforeldur, um tey í ítøkiliga førinum eru egnað í mun til avísa barnið. Sostatt eru ikki heilt somu krøv galdandi til hesi fosturforeldur sum til onnur.

Eitt barn kann setast til fosturs, tá ið:

1. foreldrini samtykkja, at barnið verður sett í fosturheim

2. barnið ongan verja hevur

3. barnið fyribils er undir barnaverndar-nevndarinnar umsorgan uttan foreldranna samtykki.

Fosturforeldraskipanin á Barna-verndarstovuni fær upplýsingar frá barnaverndartænastunum um barnið, og hvønn tørv barnið hevur, og skal so finna ta røttu familjuna til barnið.

Við ársenda í 2023 vóru 96 góðkendar fosturfamiljur í Fosturforeldraskipanini, sum høvdu børn til fosturs ella umlætting, ella sum vóru til reiðar at taka ímóti børnum til fosturs ella umlætting. Av hesum 96 fosturfamiljunum vóru 26 í familju við barnið, og 12 vóru ein partur av umhvørvinum hjá barninum.

Umráðandi er at finna tey fosturforeldrini, sum hóska best til tað einstaka barnið. Tískil kemur fyri, at nakrar fosturfamiljur eru í skipanini, sum onkuntíð ikki hava børn. Tað kunnu vera ymisk viðurskifti, sum gera, at tað einstaka barnið ikki hóskar til hesar fosturfamiljur.

Eisini eru summar fosturfamiljur, sum verða nýttar til fleiri fyriskipanir. Til dømis, tá talan er um systkin, ella tá tað snýr seg um umlættingarfamiljur, sum hava fleiri børn í styttri tíðarskeið í senn.

Í 2023 komu 17 nýggjar umsóknir inn til Fosturforeldraskipanina, um at gerast fosturfamilja. Av teimum vóru 10 næstringar ella onnur, sum frammanundan eru partar av umhvørvinum hjá barninum.

**Talva 12: Tal av børnum til fosturs – býtt eftir kyni í 2023**

| ♀ Gentur | ♂ Dreingir | Til samans 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 39 | 38 | 77 | 82 | 85 | 89 | 87 |

Til samans vóru 77 børn til fosturs í Føroyum við árslok 2023 – fimm færri enn undanfarna ár. Av hesum børnunum til fosturs vóru 32 sett fosturs við samtykki og 45 uttan samtykki.

Kynsbýtið millum millum børn til fosturs mestsum javnvigar við 39 gentum og 38 dreingjum.

### 4.1.2 Umsorganaryvirtøkur

**Talva 13: Umsorganaryvirtøkur**

| Umsorganaryvirtøkur | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Nýggjar § 19-umsorganaryvirtøkur | 16 | 5 | 9 |
| § 23 varandi umsorganaryvirtøkur framdar í árinum | 5 | 1 | 1 |
| § 23 varandi umsorganaryvirtøkur til samans | 29 | 27 | 20 |
| Umsorganaryvirtøkur til samans | 89 | | |
| §15b, stk. 2 fyriskipanir við uppihaldi í fosturheimi ella stovni | 13 | | |

**Nýggjar § 19 umsorganaryvirtøkur**

Føroya Kærustovnur kann taka avgerð um umsorganaryvirtøku í førum, har barnið er fyri álvarsamari vanrøkt, harðskapi, ágangi ella um líkt er til, at barnsins heilsa ella menning er í álvarsomum vanda vegna foreldranna vantandi umsorgan og líknandi. Her kann vera talan um sokallaðar § 19 umsorganaryvirtøkur.

Í 2023 vórðu til samans 16 børn umsorganaryvirtikin sambært § 19 fyrstu ferð.

**§23 varandi umsorganaryvirtøkur**

Eisini kann Føroya Kærustovnur taka avgerð um at taka umsorganina varandi frá foreldrum, um tað verður mett sannlíkt, at foreldrini varandi ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan, ella at barnið verður álvarsliga misrøkt, misnýtt kynsliga ella er fyri álvarsligum sálarligum/likamligum ágangi/eyðmýking í heiminum. Ella um barnið hevur verið til fosturs í minst 5 ár, og hevur fingið so sterkt tilknýti til fosturforeldrini, at tað má metast at vera av stórum týdningi og best fyri barnið, at tað verður verandi hjá fosturforeldrunum.

Í 2023 var í 5 málum tikin nýggj avgerð um § 23 varandi umsorganaryvirtøku.

**§ 23-varandi umsorganaryvirtøkur til samans (nýggjar og verandi)**

Í 2023 vóru til samans 29 varandi umsorganaryvirtikin børn. Her er bæði talan um nýggjar og verandi umsorganaryvirtøkur. Í 2022 vóru 27 varandi umsorganaryvirtikin børn.

**Umsorganaryvirtøkur til samans**

Við ársenda 2023 vóru til samans 89 børn, sum vóru umsorganaryvirtikin

**§ 15b, stk. 2 fyriskipanir við uppihaldi í fosturheimi ella stovni**

Her er talan um framhald av fyriskipan/uppihald í fosturheimi/viðgerðarstovni.

Í 2023 vóru í 13 førum fyriskipanir ella uppihald í fosturheimi/viðgerðarstovni, har hildið var fram við fyriskipanin/uppihaldið varð longt.

## 4.2 Børn til umlætting

Tá ið viðurskiftini í heiminum ella hjá børnunum eru soleiðis, at ikki er neyðugt at seta tey til fosturs, men tey kortini hava tørv á umlætting, kunnu børnini koma í eina fosturfamilju til umlætting. Hetta merkir, at tey í styttri tíðarskeið búgva hjá fosturfamiljuni, men eru ikki umsorganaryvirtikin, og foreldrini hava framvegis umsorganarábyrgdina av børnunum.

Mest vanligt er, at børnini eru eitt ella tvey vikuskifti um mánaðin til *umlætting*, men talan kann eisini vera um eitt ávíst tíðarskeið, meðan foreldrini eitt nú fáa viðgerð fyri misnýtslu og líknandi.

Ætlanin við umlætting er at geva børnum og foreldrum nýggja orku. Koma børnini frá eini familju, sum ikki er so vælvirkandi á øllum økjum, kunnu tey síggja og kenna seg sum part av eini vælvirkandi familju, sum kann geva teimum umsorgan og upplivingar. Tað kann vera trupult at finna fosturfamiljur til umlættingarfyriskipanir. Hetta er eitt orku- og tíðarkrevjandi arbeiði fyri Fosturforeldraskipanina. Tað, at finna eina fosturfamilju til eitt barn, sum skal til umlætting, kann ofta hava við sær, at Fosturforeldraskipanin skal vitja fleiri fosturfamiljur, áðrenn rætta fosturfamiljan verður funnin.

Umlætting er ein sjálvboðin fyribyrgjandi fyriskipan, skilt á tann hátt, at barnið ella familjan kann broyta meining eftir, at fosturfamiljan er funnin og ikki ynskja umlætting kortini. Møguligt er ikki at seta í verk umlætting uttan samtykki frá tí foreldrinum, sum hevur foreldramyndugleikan.

**Talva 14: Børn til umlætting 2023 - býtt eftir kyni**

| ♀ Gentur | ♂ Dreingir | Til samans 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 17 | 26 | 43 | 60 | 67 | 58 | 57 |

Til samans 43 børn høvdu umlættingarforeldur í 2023, sum eru rættiliga nógv færri enn undanfarnu ár. Fleiri dreingir enn gentur høvdu umlættingarfamiljur.

## 4.3 Børn á stovni

Børn, ið verða sett á stovn, hava ofta stórar og samansettar avbjóðingar, sum gera, at tey ofta ikki rúmast at búgva í vanligum fosturheimi. Børn verða send á stovn uttanlands í førum, tá eingi nøktandi tilboð eru í Føroyum.

**Talva 15: Tal av børnum á stovni 2023 – býtt eftir kyni**

| ♀ Gentur | ♂ Dreingir | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| 17 | 14 | 32 | 22 | 29 |

32 børn vóru á stovni við ársenda 2023. Av hesum vóru 2 á stovni uttanlands. Í 2022 vóru 4 børn á stovni uttanlands, og í 2021 vóru 5 børn á stovni uttanlands.

Av málunum við børnunum á stovni fóru 22 fram við samtykki og 10 uttan samtykki frá foreldramyndugleikanum.

**Talva 16: Bráðfeingis avgerðir sambært § 17**

Er vandi fyri, at eitt barn verður skatt av at verða verandi í heiminum, kann barnaverndarnevndin uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, avgera at taka barnið úr heiminum uttan rættarúrskurð.

| | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| **Bráðfeingis avgerðir** sambært § 17 | 4 | 1 | 2 |

# 5 Fígging og kostnaður av barnavernd

Áðrenn barnaverndarlógin kom í gildi, vóru tað sambært barnaforsorgarlógini barnaverndarnevndirnar í einstøku kommununum, sum tóku avgerð í barnaverndarmálum, og landið rindaði útreiðslurnar av málunum. Eitt av endamálunum við nýggju lógini var at fáa greitt fíggjarligt ábyrgdarbýti millum land og kommunur á barnaverndarøkinum, soleiðis at vald og gjald fylgdust. Barnaverndarlógin ásetir tí, at kommunurnar bera kostnaðin av tí fyribyrgjandi partinum av barnaverndarøkinum, og tá børn verða sett til fosturs, meðan landið ber útreiðslurnar, tá børn verða umsorganaryvirtikin og fara á viðgerðarstovn. Kommunurnar rinda tó eitt høgt brúkaragjald í hesum sambandi svarandi til, at barnið var sett til fosturs við hægstu samsýning. Harumframt rindar landið ein árligan stuðul til Barnahúsið og fyri útreiðslur í sambandi við ókeypis advokatumboðan.

Talvan niðanfyri vísir núverandi fíggjarliga býtið millum land og kommunur á barnaverndarøkinum. Sum sæst var samlaða nýtslan til barnavernd í 2023 gott 139 mió. kr. Nýtslan hjá kommununum var samanlagt góðar 92 mió. kr., og nýtslan hjá landinum knappar 47 mió. kr. Kommunurnar bera sostatt umleið tveir triðingar av útreiðslunum á barnaverndarøkinum, meðan landið ber ein góðan triðing.

**Talva 17: Samlaður kostnaður av barnavernd í 2023**

| *í 1000 kr* | ***Land*** | ***Kommunur*** | ***Tils.*** |
|---|---|---|---|
| Barnaverndarstovnar hjá Almannaverkinum (§33) | 39.625 | 9.517 | **49.142** |
| Barnaverndarstovnar uttanlands (§35,2) | 5.704 | 1.160 | **6.864** |
| Ókeypis advokatumboðan til børn (§57) | 956 | | **956** |
| Umsiting, málsviðgerð o.a. í kommunum | | 32.793 | **32.793** |
| § 15-Fyriskipanir | | 16.673 | **16.673** |
| Fosturforeldraskipanin | | 29.553 | **29.553** |
| Barnaverndarstovan og Barnahúsið | 650 | 2.500 | **3.150** |
| **Til samans** | **46.935** | **92.197** | **139.132** |
| Til samans í prosent | 34% | 66% | **100%** |

(Keldur: gjaldstovan.fo og barnaverndartænasturnar)

## 5.1 Samanbering við Danmark

Verða samlaðu útreiðslurnar á 139 mió. kr. settar í mun til samlaða talið av børnum undir 18 ár, so er talan um ein kostnað á 10.510 kr. í miðal fyri hvørt barnið. Samsvarandi talið í Danmark er 16.200 kr. í miðal fyri hvørt barnið. Tað vil siga, at danska barnaverndarskipanin sær út til at vera meir enn helvtin dýrari enn tann føroyska.

## 5.2 Útreiðslubýtið á barnaverndarøkinum

Myndin niðanfyri vísir býtið millum ymisku útreiðslurnar innan barnavernd í mun hvat slag av útreiðslum, talan er um. Greitt verður frá hvørjum einstøkum útreiðsluslagi niðanfyri.

**Mynd 1: Býti av samlaðu útreiðslunum til barnavernd**




**Barnaverndarstovnar hjá Almannaverkinum og stovnar uttanlands**

Ein góður triðingur (35,3 %) av samlaðu játtanini til barnavernd fer til at reka barnaverndarstovnarnar hjá Almannaverkinum. Harafturat fara 4,9 % av játtanini til stovnsuppihald uttanlands. Tað vil siga, at meira enn 40 % av útreiðslunum á barnaverndarøkinum fara til barnaverndarstovnar.

Sum nevnt er tað landið, sum heldur útreiðslurnar til barnaverndarstovnar, herundir eisini til uppihald á barnaverndarstovnum uttanlands. Landið rindar tó ikki allan kostnaðin av barnaverndarstovnunum. Ásett er, at avvarðandi barnaverndarøki skal rinda landinum eina upphædd fyri uppihaldið, ið samsvarar við tað, ið fosturforeldur høvdu fingið, um barnið í staðin var sett til fosturs við hægstu samsýning.

Samlaðu útreiðslurnar til barnaverndarstovnarnar hjá Almannaverkinum vóru 49,1 mió. kr. í 2023. Av hesum rindaðu kommunurnar umleið 9,5 mió. kr. Samlaðu útreiðslurnar til barnaverndarstovnar í Danmark vóru umleið 6,9 mió. kr. í 2023. Av hesum rindaðu kommunurnar umleið 1,2 mió. kr.

Sostatt rindaðu kommunurnar samanlagt umleið 10,7 mió. kr. til uppihald á barnaverndarstovnum. Hetta samsvarar við 19 % av samlaðu útreiðslunum til barnaverndarstovnar.

**Barnaverndarstovan, Fosturforeldraskipanin og Barnahúsið**

Barnaverndarstovan og Fosturforeldraskipanin verða fíggjað við einum árligum gjaldi frá hvørjari kommunu ásett í mun til fólkatalið. Samlaðu gjøldini fyri 2023 vóru 2,5 mió. kr. Útreiðslurnar til Barnaverndarstovuna umfata eisini raksturin av Barnahúsinum. Landið letur í hesum sambandi ein árligan stuðul til Barnahúsið á 650 tús. kr. árliga. Samanlagt er sostatt talan um 3,150 mió. kr., ið samsvarar við 2,3 % av samlaðu játtanini.

**Umsiting o.a.**

Umsiting o. a. umfatar lønarútreiðslur, hølisútreiðslur,el, hita, reingerð, viðlíkahald, skrivstovuhald og annað úti í kommununum. Í 2023 fóru 32,8 mió. kr. til umsiting o.a. Tað samsvarar við 23,6 % av samlaðu nýtsluni. Kommunurnar rinda allan kostnaðin til umsiting o.a.

**§ 15 fyriskipanir**

Um tað vísir seg at vera neyðugt at veita barninum ella familjuni hjálp, kann barnaverndarnevndin seta fyribyrgjandi fyriskipanir í verk. Samlaða játtanin til hesar fyriskipanir var 16,7 mió. kr. í 2023. Tað samsvarar við 12 % av samlaðu játtanini. Kommunurnar rinda allan kostnaðin til hesar fyriskipanir.

**Útreiðslur í sambandi við fosturuppihald**

Útreiðslurnar fevna um samsýning til fosturforeldur, vistarhald/klæði, stovns- og skúlagjøld til aðrar kommunur o.t., útreiðslur í sambandi við samveru, stovnan og útbúnaður, lummapeningur og annar kostnaður í sambandi við fosturuppihald. Í 2023 vóru útreiðslurnar 29,6 mió. kr. Tað samsvarar við 21,2 % av samlaðu nýtsluni. Kommunurnar bera allan hendan kostnaðin.

**Advokatumboðan**

Verður eitt barn sett heiman, og foreldramyndugleikin ella barnið, ið er fylt 15 ár, ikki hevur givið samtykki, hava foreldrini og barnið rætt til at verða umboðað ókeypis av advokati. Í málum, har samtykki er fingið, kann Føroya Kærustovnur gera av, um foreldur og børn kunnu fáa ókeypis umboðan. Útreiðslurnar til advokatin ber landið. Í samverumálum kann foreldrið, sum ikki hevur foreldramyndugleikan, eisini fáa ókeypis umboðan.

Útreiðslurnar eru ymiskar, men vanliga liggja tær á umleið 600-800 tús. kr., ið samsvarar við 0,7 % av samlaðu játtanini. Í 2023 var talan um 956 tús. kr.

## 5.3 Útreiðslur hjá kommunum eftir samstarvsøki

Einans Tórshavnar kommuna rekur barnaverndarøkið sjálvstøðugt. Alla aðrastaðni verður økið rikið í samstørvum. Sambært § 68, stk. 2, í barnaverndarlógini skulu hesar kommunur býta útreiðslurnar svarandi til fólkatalið í samstarvinum.

Samlaðu útreiðslurnar hjá kommununum av barnaverndarøkinum vóru 91 mió. kr. í 2023. Hetta er 7,3 % meira enn í 2022.

Sum víst niðanfyri, sveiggjar kostnaðurin rættiliga nógv, serliga í smærru økjunum uttanfyri Havnina. Orsøkin er tann, at eindirnar eru so smáar í mun til kostnaðin á einstøkum málum. Kostnaðurin økist tí munandi, tá kostnaðarmikil mál taka seg upp í fíggjarárinum. Ein onnur orsøk til sveigginni kann vera, at foreldur, sum hava børn, sum eru umsorganaryvirtikin, flyta. Tá flytur málið og kostnaðurin sum útgangsstøði við. Ein onnur kann vera, at børn fylla 18 ár, og ikki búgva á stovni longur.

**Talva 18: Útreiðslurnar hjá kommununum av barnaverndarøkinum (tús. kr)**

| | 2022 | 2023 | Broyting |
|---|---|---|---|
| Norðoyggjar | 9.803 | 9.804 | 0,0% |
| Eystur og Fuglafjørð | 4.380 | 5.701 | 30,2% |
| Skálafjørð | 8.509 | 10.769 | 26,6% |
| VEKS | 3.290 | 3.920 | 19,1% |
| Vágar | 5.304 | 6.075 | 14,5% |
| Sandoy | 2443 | 2667 | 9,2% |
| Suðuroy | 8.531 | 7.824 | -8,3% |
| Tórshavn | 42.583 | 44.275 | 4,0% |
| **Til samans** | **84.843** | **91.035** | **7,3%** |

(Kelda: gjaldstovan.fo)

## 5.4 Barnavernd í mun til samlaðu útreiðslurnar hjá kommunum

Samlaðu útreiðslurnar hjá kommununum eru knappar 3,4 mia. kr. Tað vil siga, at útreiðslur til barnavernd eru 2,6 % av samlaðu útreiðslunum. Verður hugt í mun til rakstrarútreiðslurnar – tað vil siga uttan íløgur – so samsvara útreiðslurnar til barnavernd við 3,5 % av samlaðu rakstrarútreiðslunum.

## 5.5 Tal á starvsfólki og tímum við ársenda 2023

Niðanfyri er uppsett ávikavist tal á starvsfólki og tal á tímum í 2023.

**Talva 19: Tal á starvsfólki í barnaverndartænastunum við ársenda 2023**

| | Norður | Eystur | Skálafj. | VEKS | Vágar | Tórshavn | Sandoy | Suðuroy | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sosialráðgevar og málsviðgerar | 4 | 2 | 4 | 3 | 2 | 13 | 0,75 | 3 | 31,75 | 29 | 26,75 |
| Sálarfrøðingar | 1 | 1 | 1 | | | 2 | | 1 | 6 | 6 | 6 |
| Familjuráðgevar | | | | | 1 | 5 | | 1 | 7 | 7 | 7 |
| Skrivarar | 1 | 1 | 1 | | 0,25 | 2 | 0,32 | 1 | 6,57 | 7 | 6 |
| Leiðari | 1 | 1 | 1 | 1 | 0,75 | 3 | 0,25 | 1 | 9 | 8 | 7,25 |
| **Til samans** | **7** | **5** | **7** | **4** | **4** | **25** | **1,32** | **7** | **60,32** | **57** | **53** |

**Talva 20: Tal á tímum um vikuna í barnaverndartænastunum við ársenda 2023**

| | Norður | Eystur | Skálafj. | VEKS | Vágar | Tórshavn | Sandoy | Suðuroy | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sosialráðgevar og málsviðgerar | 135 | 78 | 148 | 117 | 78 | 429 | 30 | 108 | 1123 | 1085 | 983 |
| Sálarfrøðingar | 40 | 30 | 24 | | | 78 | | 15 | 187 | 203 | 210 |
| Familjuráðgevar | | | | | 32 | 200 | | 30 | 262 | 262 | 263 |
| Skrivarar | 35 | 20 | 39 | | 10 | 78 | 12,5 | 20 | 215 | 223,5 | 213 |
| Leiðari | 40 | 40 | 39 | 40 | 30 | 117 | 9 | 39 | 354 | 286 | 286 |
| **Til samans** | **250** | **168** | **250** | **157** | **150** | **902** | **51,5** | **212** | **2141** | **2060** | **1955** |